# Kunnandi fundur um kommunuvalið 2020

- Um uppgávur hjá kommunum og valstýrum og valnevndum í sambandi við kommunuval

UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

# Valnevnd og valstýri

Valnevnd

- Skipar fyri valinum

Valstýri

- Í kommunum, sum hava fleiri valstøð, setur kommunustýrið eitt valstýri at stíla fyri  valinum har

# Valrættur og valbæri

Treytir

- 18 ár og annars lúka treytirnar fyri valrætti og valbæri til løgtingið
- Tilmeldaður fólkayvirlitið í kommununi 2 vikur áðrenn valdagin og er búsitandi í kommununi á valdegnum

Gevið gætur

- Ríkisborgarar úr øðrum londum
- Verjumál, sbr. verjumálslógini § 6
- Veljari skal standa á vallista

# Vallisti

Kommunustýrið letur gera ein lista yvir veljarar í seinasta lagi 1. september 2020

Vallistin skal leggjast fram til alment eftirlit í seinasta lagi týsdagin 13. oktober

- Kæra
- Rætting í vallista til og við valdagin

# Valkort

Kommunustýrið kann gera av, at valkort verða send út til veljarar

Valkort skal innihalda hesar upplýsingar um veljaran

- ✓ Navn
- ✓ Bústað
- ✓ Talnummar á vallistanum

Valkort skulu sendast veljaranum í seinasta lagi 27. oktober 2020

# Valevnislistar

Valevni skal vera á einum valevnislista

Valevnislistar skulu latast

- valnevndarformanninum
- kommununi

Í seinasta lagi kl. 18 týsdagin 20. oktober

# Valevnislisti - dømi

| | Fult navn | Starv | Bústaður | Føðingardagur | Møgulig váttan |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | | | | |
| 2 | | | | | |
| 3 | | | | | |
| 4 | | | | | |
| 5 | | | | | |
| 6 | | | | | |
| 7 | | | | | |
| 8 | | | | | |
| 9 | | | | | |
| 10 | | | | | |
| 11 | | | | | |
| 12 | | | | | |
| 13 | | | | | |
| 14 | | | | | |
| 15 | | | | | |
| 16 | | | | | |
| 17 | | | | | |

# Listi yvir stillarar

| | **Stillarar** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Fult navn | Starv | Bústaður | Føðingardagur | Undirskrift |
| 1 | | | | | |
| 2 | | | | | |
| 3 | | | | | |
| 4 | | | | | |
| 5 | | | | | |
| 6 | | | | | |
| 7 | | | | | |
| 8 | | | | | |
| 9 | | | | | |
| 10 | | | | | |
| 11 | | | | | |
| 13 | | | | | |
| 14 | | | | | |
| 15 | | | | | |
| 16 | | | | | |
| 17 | | | | | |
| 18 | | | | | |
| 19 | | | | | |
| 20 | | | | | |
| 21 | | | | | |
| 22 | | | | | |
| 23 | | | | | |
| 24 | | | | | |
| 25 | | | | | |

# Tal á kommunustýrislimum

**Kommunur við í minsta lagi 7 og í mesta lagi 17 kommunustýrislimum:**

| Kommuna | Fólkatalið 1/1-20 | Kommunustýrislimir* |
|---|---|---|
| Tórshavnar | 21.965 | 13 |
| Klaksvíkar | 5.249 | 11 |
| Runavíkar | 4.150 | 11 |
| Eysturkommuna | 2.156 | 9 |
| Vága | 2.132 | 11 |
| Sunda | 1.811 | 11 |
| Tvøroyrar | 1.713 | 7 |
| Fuglafjarðar | 1.589 | 9 |
| Vágs | 1.352 | 9 |
| Nes | 1.338 | 7 |
| Vestmanna | 1.245 | 7 |
| Sørvágs | 1.235 | 7 |
| Sjóvar | 1.089 | 7 |
| Eiðis | 762 | 7 |
| Hvalbiar | 679 | 7 |
| Kvívíkar | 597 | 7 |
| Sands | 531 | 7 |

**Kommunur við 5 kommunustýrislimum**

| Kommuna | Fólkatalið 1/1-20 |
|---|---|
| Skopunar | 440 |
| Hvannasunds | 416 |
| Sumbiar | 358 |
| Viðareiðis | 346 |
| Porkeris | 318 |
| Kunoyar | 155 |
| Skálavíkar | 144 |
| Húsavíkar | 115 |

**Kommunur við 3 kommunustýrislimum**

| Kommuna | Fólkatalið 1/1-20 |
|---|---|
| Hovs | 99 |
| Fámjins | 83 |
| Skúvoyar | 40 |
| Fugloyar | 38 |

# Brek við valevnislistum

Valevnislisti ófullfíggjaður

- Valnevndin boðar stillaranum frá, sum fær 24 tímar at bøta um brekið

Eitt valevni er á fleiri valevnislistum

- Valnevndin boðar valevninum frá í seinasta lagi 29. okt.
- Valevni boðar valnevndini frá í seinasta lagi 30. okt. hvørjum lista hann vil standa á

Um fleiri valevni standa á listanum enn loyvt

- Valevnislisti ógildugur

Um valevni ikki er valbært ella ivi er um hvør persónurin er

- Strikast av listanum

Um sami veljari er stillari á fleiri listum

- Strikast á øllum listum

# Góðkendir valevnislistar

Góðkendu valevnislistarnir fáa eitt bókstavafrámerki

Valevnini fáa eitt talnummar, soleiðis sum tey eri sett upp á valevnislistanum

# Atkvøðuseðlar

Valnevndin útvegar neyðugt tal av atkvøðuseðlum, sum tú ikki skalt kunna síggja ígjøgnum

Krøv til atkvøðuseðilin

- Upplýsing um valdag og valár
- Bókstavs- og floksfrámerki
- Nøvnini á øllum valevnum
- Valevnislistarnir og valevnini skulu verða skild hvør frá øðrum
- Einki annað orð, bókstavur ella frámerki má vera á atkvøðuseðlinum

# Valhøli, atkvøðurúm og atkvøðukassar

Kommunustýrið avgerð hvar valið fer fram

Krøv til atkvøðurúm

- Eingin uttanífrá skal kunna síggja hvussu atkvøtt verður

Yvirlit yvir valevni skulu hanga uppi í valhølinum og atkvøðurúminum

Prentað vegleiðing um ásetingar í lógini, sum hava størstan týdning fyri valið

Atkvøðukassar

- Læstir
- Eingin atkvøðuseðil skal kunna takast uppúr, uttan at kassin verður latin upp

# Kommunuval og covid-19

Handreinføri og frástøða er umráðandi

Maska og einnýtishandskar

Spritta pennar og skifta pennar út

Um ivamál - Seta seg í samband við koronaráðgevingina á corona@arb.fo ella tlf. 304040

# Atkvøðugreiðslan byrjar

Uppgávan hjá valnevndar- ella valstýrisformanninum tá ið atkvøðugreiðslan byrjar:

- Kunngerð nøvnini á limunum í nevndini ella stýrinum
- Kunngerð talið á kommunustýrislimum, ið skulu veljast
- Kunngerð hvørjir valevnislistar eru móttiknir
- Vísir fram tómar atkvøðukassar og læsir atkvøðukassarnar

# Valbók

Valnevndar- ella valstýrisformaðurin hevur eftirlit við valbókini

Hvat verður ført í valbókina?

- Alt, ið hevur týdning fyri valið, t.d.
  - Tal á valevnislistum við nøvnum á valevnum
  - Tal á atkvøðuseðlum, ið skulu nýtast til valið
  - Tal á gildum og ógildum atkvøðuseðlum
  - Tal á gildum og ógildum brævatkvøðum
  - Atkvøðutølini fyri hvønn valevnislista og fyri hvørt valevni
  - Nøvnini á teimum valdu
  - Annars avgerðir, sum valnevndin tekur viðvíkjandi valinum

Eftir valið, skal valbókin undirskrivast av allari valnevndini og so í varðveitslu hjá kommunustýrinum

# Atferðarreglur

Øll, sum eru í valhølinum, skulu lýða boðum formansins

Tað er bannað limum í valnevndini, valstýrinum ella hjálparfólki at halda eyga við, hvussu veljari hevur atkvøtt

# Atkvøðugreiðslan

Veljari

- ✓ letur inn valkortið,
- ✓ verður avmerktur á vallistanum og
- ✓ fær atkvøðuseðilin útflýggjaðan

Valnevndin/-stýrið kann biðja um samleikaprógv

Um veljari ikki hevur valkort við → Nýtt valkort

So

- ✓ fer veljarin inn í atkvøðuhølið, har eingin annar er
- ✓ setir veljarin kross við ein valevnislista og/ella fyri eitt valevni á sama lista
- ✓ leggur veljarin atkvøðuseðilin saman og setir hann beint í atkvøðukassan

# Hjálp til at greiða atkvøðu

§ 15 í kommunuvallógini varð broytt í september.

Veljari kann fáa hjálp at greiða atkvøðu í atkvøðuhølinum ella beint uttan fyri valhølið

- ➢ veljarin kann fáa hjálp frá tveimum persónum
- ➢ veljarin kann krevja, at annar av persónunum er ein, sum hann sjálvur vísir á
- ➢ tey, sum veita hjálp við atkvøðugreiðslu, hava tagnarskyldu

Veljarin skal skilliga kunna siga ella á annan hátt vísa hvørjum hann vil atkvøða fyri

Veljari, sum greiðir brævatkvøðu, kann eisini fáa líknandi hjálp (nýtt)

# Atkvøðugreiðslan endar

Valið endar kl. 20

Tá ið steðgur kemur í atkvøðugreiðsluna aftan á kl. 20, skal valið vera lýst liðugt

Limir í valnevndini/-stýrinum og hjálparfólk kunnu atkvøða

# Atkvøðugreiðsla við brævi

Kommunuvallógin vísir til reglurnar í løgtingsvallógini

Nær

- 4 mánaðar áðrenn valdagin (10. juli 2020)
- ella 1 viku áðrenn (3. november 2020)
- í seinasta lagi dagin fyri valdagin

Hvar

- føroyskum, donskum ella grønlendskum kommunum
- føroyskum og donskum sendistovum/konsulátum
- á sjúkrahúsi ella stovni
- heima við hús
- varðhaldinum

# Atkvøðugreiðsla við brævi
## - kommunan

Hvat ger kommunan við móttiknar brævatkvøður?

- savnar saman
- føra yvirlit yvir
  - navn og bústað hjá avsendara
  - nær brævatkvøðan er móttikin
- brævbjálvarnir verða sendir óopnaðir til viðkomandi valstýri
- brævbjálvarnir skulu vera valstýrinum í hendi áðrenn atkvøðugreiðslan byrjar

# Atkvøðugreiðsla við brævi
## - valstýrið

Hvat verður gjørt á valstaðnum?

- áðrenn atkvøðugreiðslan byrjar
  - valstýrið opnar størru brævbjálvarnar og kannað verður um viðkomandi stendur á vallista → avmerktur á vallistanum
  - fleiri brævatkvøður frá sama veljara – seinast dagfesta fylgibrævið
  - um veljari ikki hevur valrætt verður atkvøðan ikki tald við
  - brævbjálvarnir, sum verða taldir við, verða goymdir við fylgibrævinum og størra brævbjálvanum til atkvøðugreiðslan er endað
  - lítlu brævbjálvarnir verða settir í ein atkvøðukassa og blandaðir og ikki opnaðir fyrr enn uppteljingin ger hetta neyðugt
  - ov seint innkomnar brævatkvøður verða liggjandi óopnaðar og verða ikki taldar við
  - veljari kann atkvøða á valdegnum, hóast hann hevur greitt brævatkvøðu

# Loyniligt val

Valið er loyniligt

- dómstólarnir kann ikki krevja at fáa at vita, hvørjum ein veljari hevur atkvøtt fyri
- eingin í valhølinum hevur loyvi at geva veljaranum ráð, ávísing ella tilelving um hvønn hann skal velja
- tað er ikki loyvt at kanna eftir, um veljarar greiða atkvøðu

# Atkvøðuteljing

Atkvøðurnar verða taldar upp, so skjótt atkvøðugreiðslan er av

Atkvøðuteljingin er almenn og fer fram á valstaðnum

Ein atkvøðuseðil er ógildur

- um tað ikki við vissu sæst, hvønn valevnislista veljarin hevur viljað atkvøtt fyri,
- um atkvøðuseðilin er øðrvísi vorðin enn teir, sum útflýggjaðir eru til atkvøðugreiðsluna,
- um á atkvøðuseðilin er skrivað annað enn ein krossur ella valevnisnavn, ella um atkvøðuseðlinum við vilja er givið slíkt eyðkenni, at tað sæst, hvør veljarin er

# Soleiðis atkvøður tú



# Atkvøðuteljingin endar

Valnevndin/-stýrið ger valið upp

Í kommunum við fleiri atkvøðu økjum, kemur valnevndin saman í seinasta lagi dagin eftir atkvøðugreiðsluna, fyri at gera upp fyri alla kommununa.

Í kommunum við einum valstaði verður úrslitið ført beint inn í valbókina og kunngjørt

Samlaða atkvøðutalið verður borið saman við valkortini

# Uppgerð av valinum

- Endalig uppgerð sama dag ella dagin eftir
- Avgerast skal hvussu nógv valevni verða vald fyri hvønn valevnislista. Hetta verður gjørt eftir d'Hondt leistinum

Dømi – 7 kommunustýrislimir

| | **1** | **2** | **3** | **4** | **5** |
|---|---|---|---|---|---|
| **A** | 260 | 130 | 86,7 | 65 | 52 |
| **B** | 93 | 46,5 | 31,0 | 23,3 | 18,6 |
| **C** | 370 | 185 | 123,3 | 92,5 | 74 |

# Uppgerð av valinum

Persónligu atkvøðutølini gera av hvør verður valdur inn fyri valevnislistarnar

Valevni, ið ikki verða vald, verða roknað sum tiltaksfólk fyri tey valdu í røð eftir persónliga atkvøðutalinum

Fer kommunustýrislimur frá í valskeiðinum, og er einki tiltaksfólk, skal landsstýrið skipa fyri vali av so mongum limum sum resta í

# Uppgerð av valinum

Valbókin verður førd og latin kommunustýrinum

Atkvøðutilfarið latið kommunustýrinum

Møgulig fínteljing skal fara fram í seinasta lagi 17. november 2020

Kommunan skal goyma atkvøðutilfarið, til kærufreistin er farin, ella møgulig klaga er endaliga viðgjørt.

# Fráboðan og frítøka

Valnevndin boðar teim valdu frá

Kommunustýri kann loyva persónum at sleppa undan vali vegna

- ringa heilsu
- starv ella
- virki ella tílíkt

# Kæra

Kærast skal um valið í seinasta lagi 19. november 2020

Kommunustýrið skal viðgera kærur á kommunustýrisfundi í seinasta lagi 29. november 2020

- Áðrenn kommunustýrið tekur avgerð skal valnevndin fáa høvi at ummæla kæruna

Niðurstøða kommunustýrisins kann vera skotin inn fyri landsstýrismannin í seinasta lagi 14 dagar eftir at avgerðin er tikin

Um valið verður lýst ógilt, verður umval sum skjótast

# Spurningar?

Vælkomin at senda spurningar til

Hilmar Høgenni - hilmarh@uvmr.fo

Jónas Tór Næs - jonasn@uvmr.fo